# Nýggjan skúlastjóra

**Strendur:** Í lýsing í bløðunum lýsir Mentamálaráðið við at starvið sum skúlastjóri við Stranda skúla er leyst at søkja frá 1. mars í ár. Høvuðsuppgávan hjá nýggja stjóranum verður at standa á odda fyri eini framhaldandi menning á námsfrøðiliga og fyrisitingarliga økinum. Hann skal eisini seta í verk eina menningarætlan fyri skúlan og seta í verk ítøkiligar broytingar samsvarandi visjónini hjá Mentamálaráðnum. Í Stranda skúla eru um 200 næmingar í 1. til 10. flokk. 22 lærarar starvast við skúlan.



# Ársins fyrstuhjálpari finnast

Reyði Krossur: Felagsskapurin sóknast nú eftir uppskotum til, hvør skal tilnevnast heitið sum ársins fyrstuhjálpari í 2007. Tann, sum verður settur í uppskot, skal í farna ári á ein serligan hátt hava givið kropsliga ella sálarliga fyrstuhjálp, og á tann hátt virka sum ein fyrimynd hjá øðrum. - Endamálið er ikki bert at tilnevna Ársins fyrstuhjálpara. Endamálið er somuleiðis at eggja øðrum at læra seg fyrstuhjálp, soleiðis at fleiri mannalív kunnu verða bjargað, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi. Bæði einstaklingar, feløg, løgregla og aðrir stovnar kunnu senda inn uppskot, og eiga hesi at vera Reyða Krossi í hendi í seinasta lagi tann 31. januar.

# Tey vælbjargaðu fáa enn meiri í skattalætta



*Aftur í ár fáa teir føroyingar, sum hava góða løn, ein stóran skattalætta ímeðan tey límaløntu fáa nakrar fáar krónur*

**Aftur í ár er ætlanin, at lata ein skattalætta, men tað verða tey vælbjargaðu, sum fáa tann størsta skattalættan meðan verkafólkið fær lítið og onki og tað átala arbeiðarafeløgini**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Aftur í ár er ætlanin at lata tey vælbjargaðu fáa ein stóran skattalætta.

Hinvegin er ikki ætlanin at verkafólk og onnur láglønt skulu hava nakran serligan skattalætta.

Arbeiðarafeløgini halda, at skattalættin er so órættvísur, at tey átala politisku avgerðina og heita á politikararnar um at strika ætlaða skattalættan fyri í ár.

Vit hava spurt Hans Joensen, formann í Havnar Arbeiðsmannafelag, hvørjar vónir hann setir til tað nýggju samgonguna, sum skal skipast eftir løgtingsvalið leygardagin.

Hann sigur, at hann vónar, at tað nýggja samgongan fer at strika ætlaða skattalættan fyri í ár, tí hann er so órættvísur, at hann er mest fyri tey vælbjargaðu.

- Seinastu tíðina er kikarin settur á tey bleytu virðini og tað hevði kanska verið rættari at brúkt skattalættan til at fíggja vælferðartænastur við, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Eisini Samtak, sum er samskipanin ímillum Havnar Arbeiðsmannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Fiskimannafelagið, hevur beinleiðis heitt á politikararnar um at strika skattalættan í ár.

### Stuðla føroyingum

Eitt annað mál, sum hevur verið nógv umrøtt, er trotið á arbeiðsmegi og har hevur politiski myndugleikin start seg blindan upp á eina einastu loysn og tað er at fáa útlendska arbeiðsmegi hendavegin.

- Samstundis vita vit, at tað er ein rættiligur hópur av føroyskum handverkarum uttanlands og arbeiðir og tað tykist eitt sindur øvugt, at vit so skulu fáa útlendingar higar í staðin – sum harafturat skulu hava trygd fyri fullari arbeiðsviku, samstundis sum føroyingar onga trygd hava fyri einum tí einasta tíma. Sostatt eru tað kreftir sum vilja hava, at útlendsk arbeiðsmegi skal hava størri rættindi í Føroyum enn okkara egna arbeiðsmegi.

Hans Joensen heldur hinvegin, at politiski myndugleikin kundi umhugsa, hvussu føroyingarnir, sum arbeiða uttanlands, kunnu stuðlast at koma heimaftur at arbeiða.

- Undir øllum umstøðum er tað ein avgjørd fortreyt fyri at fáa útlendingar hendavegin at arbeiða, at tað er undir heilt nágreiniliga skipaðum viðurskiftum.

Hann heldur eisini, at virkisleiðslur kundi umhugsa at skipa fyri, so at skúlaungdómur í størri mun slapp at arbeiða eftir skúlatíð.

### Skattalættin 2008

Soleiðis verður skattalættin í ár býttur ímillum teir ymsu lønarbólkarnar. Tað sæst týðiliga, at tað eru tær høgu inntøkurnar, sum eisini fáa nógv mest í skattalætta ímeðan tey lágløntu fáa nakrar hundraðkrónuseðlar í skattalætta í alt ár.

Fakfeløg halda, at skattalættin er so órættvísur, at tey átala politisku avgerðina

| Ársinntøka | Skattalætti í 2008 |
|---|---|
| 120.000 kr. | 240 kr. |
| 180.000 kr. | 680 kr. |
| 200.000 kr. | 690 kr. |
| 230.000 kr. | 765 kr. |
| 500.000 kr. | 6.240 kr. |
| 1.000.000 kr. | 7.490 kr. |

# Ongar ætlanir at avtaka skattalættan

**Í samgongusamráðingunum í Løgtingshúsinum í hesum døgum, eru ongar ætlanir um at avtaka skattalættan í ár, hóast fakfeløg mótmæla**

SKATTALÆTTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Teir tríggir flokkarnir, sum nú samráðast um at skipa nýggja samgongu, hava ongar ætlanir um at avtaka skattalættan fyri í ár.

Tað skilst á teimum politikarum, vit hava tosað við.

Vit fingu ikki orðið á samgonguleiðaran, Jóannes Eidesgaard, løgmann, men Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur, at ivingarsamt um tað ber til at røra ein skattalætta, sum er komin í gildi og tað hevur heldur ikki verið í valskránni hjá Javnaðarflokkinum at strika ein skattalætta við afturvirkandi kraft og sum langt síðani er samtyktur.

Kortini leggur hann stóran dent á, at Javnaðarflokkurin góðtekur undir ongum umstøðum, at fleiri nýggir skattalættar verða lætnir í hesum valskeiðnum, tí peningurin skal brúkast til vælferðartænastur.

Skattalættin fyri í ár er ikki nýggjur, tí hann varð samtyktur longu í 2006.

Jørgen Niclasen, formaður fólkafloksins, hevur samstundis gjørt púra greitt, at tað kemur ikki upp á tal at hækka skattin í hesum valskeiðnum.

Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur bara eina viðmerking og hon er, at í samgongusamráðingunum higartil, eru tey als ikki komin til at tosa um skattalætta.

Hinvegin kann viðmerkjast, at tá ið hann tók við sum landsstýrismaður í fíggjarmálum í fjør summar, varð hann ímóti skattalættanum og tá ið samgongan legði uppskot um fíggjarlóg fyri 2008 fram, var skattalættin fyri í ár munandi skerdur afturímóti upprunaliga ætlanini, sum varð samtykt nakað eftir, at hendan samgongan tók við.

Men so varð løgtingsval útskrivað og harvið datt skerjingin burtur og sostatt er tað upprunaliga skattalættin, sum er í gildið og tað er hesum, fakfeløgini mótmæla.

### Ólógligt og tvørligt

Sakførarar, vit hava tosað við, staðfesta, at tað er ólógligt at broyta ein skattalætta, sum er komin í gildið.

- Stýrisskipanarlógin beinleiðis forðar fyri at løggeva við afturvirkandi kraft og skattalættin kom í gildi 1. januar, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

Tað er bara loyvt at løggeva við afturvirkandi kraft, tá ið tað er til fyrimuns fyri borgaran og at hækka skattin kann valla sigast at vera til fyrimuns fyri borgaran.

Hinvegin er tað onki, ið forðar Løgtinginum í broyta skattalógina aftur mitt í einum ári og sostatt ber væl til at leggja uppskot fyri løgtingið, sum avtekur skattalættan frá 1. mars, fyri at nevna eitt dømi.

Men tekniskt er tað torført og skapar stórar, umsitingarligar trupulleikar, sigur Sofus Johannesen á Tolli og skatti.

Hann sigur, at í grundregluni fylgir skattaárið álmanakkaárinum og skal skatturin broytast mitt í einum ári, skulu tvær uppgerðir – ella í veruleikanum tvey skattaár- gerast, og tað elvir til stórar trupulleikar.